

*Tveir av teimum hangandi glasskulpturunum, ið tóku ummælaran fullkomiliga á bóli*

*Yrking, sum Rói Patursson bar fram, tá framsýningin varð sett*

**Vælkomin til framsýningina hjá Trónda nítjanda juli í árinum tjúguhundrað og níggju**

*Stundum skilji eg litirnar lætt og líkatil.*
*Men so við eitt er alt sum læst og lokað.*
*Stundum er upplýst hvørt myrkursgil.*
*Men so er leiðin aftur tann tjúkka toka.*

*Í sjónini er ein egin máttur.*
*Í skili og kenslu ein egin sangur.*
*Í skugganum ein egin dráttur .*
*Í glasinum ein bláur klangur.*

*Vatnið kann avmarkast til H2O*
*og lapis lazuli til ein kemiskan formil,*
*men listin er óendalig bæði so og so*
*har finst eingin evsti formil.*

*Hon búsetist við egnum lógum.*
*Tað grør undir spyrjandi fóti.*
*Vit sóknast eftir kendum slóðum,*
*men listin spyr bara afturímóti.*

*Í hesi høll glampar hann væl*
*ultramarini dropin*

*(Her sigldi eg á eina tankafles:*
*Hóast um listaklandur eg ei skal røða*
*so er Skipasmiðjan ein onnur søga,*
*og við Múrin er undantaksstøða.*
*Hetta var ein parantes)*

*Men sum sagt: Í hesi høll skyggir hann væl*
*ultramarini dropin.*
*Kvinnur og kallar gangið fram í sal*
*nú Tróndur aftur er lopin*
*úr mimesis og expressiónum.*

*Við hesum er framsýningin opin*
*í øllum dimensiónum.*

*Vakurleikin er ítøkiligur fleiri staðni á framsýningini*